**Vestan fyri Mykines,**

1. Vestan fyri Mykines,
har flýgur ein vøkur súla,
sveimar yvir hav og fles,
meðan børnini eru í skúla.

2. Tá ið hon sær eina sild,
hon stoytir seg undir kav
flýgur við henni í búkinum,
yvir tað bláa hav.

3. Tá hon móð at flúgva er,
til ungan hon kemur heim,
setir seg á rókina,
so hvít og fín og rein.

**Dukka mín er blá**

1. Dukka mín er blá,
hestur mín er svartur,
ketta mín er grá,
máni mín er bjartur,
gyllir hvørja á.

2. Og ein summardag
fara vit at ferðast
langa leið av stað,
tá skal dukkan berast,
tá er systir glað.